## Mazda á odda



Ein týsk brúkarakanning millum 25.000 eigarar av nýggjum bilum, í bilblaðnum Auto Bild, vísir, at Mazda er best umtókta bilmerki, bæði bilarnir sjálvir og tænastustøðið

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai góð úrslit



Í kanningini hjá Auto Bild lógu Hyundai millum tey best umtóktu bilmerkini á hædd fleiri janaskar bilar og framman fyri fleiri evropeiskar

*Kelda: Motor Magasinet*

## Stjórnin hjálpir Saab



Svenska stjórnin ynskir at hjálpa Saab-verksmiðjuni við infrastrukturinum við at útbyggja veganetið millum Trollhättan og Gøteborg í kapping við Opel í Týsklandi. GM hevur nevniliga ætlanir um at lata eina av sínum evropeisku verksmiðjum aftur

*Kelda: Motor Magasinet*

# Acura Legend til amerikanarar



*Nýggi Acura Legend, ið kemur á markanðin í 2006, verður um ein elegantur og framkomin luksusbilur*



*Innan er alt tað reina luksus við nøtutræ og leður*



*Acura legend er ein stórur luksusbilur*

**Acura er luksusmerkið hjá Honda til eitt nú amerikanska marknaðin, á sama hátt sum Toyota hava Lexus og Nissan hava Infiniti. Í 2006 kemur ein heilt nýggjur og framkomin Acura**

**Legend luksusbilur á marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@gunnarsson*

Legend útgávan hjá Honda hevur ongantíð rættuliga sligið ígjøgnum í Evropa, men í USA er Legend ein sonn "succes" undir navninum Acura Legend.

Hetta kann tó broytast, tá nýggi Honda/Acura Legend kemur á markanðin í 2006. Talan verður um ein elegantan og framkomnan luksusbil.

Nýggi Legend fær framkomnu SH-AWD (Super Handling All Wheel Drive) 4x4-skipanina, sum varierar motorkaftina millum for- og bakhjól og millum bakhjólini. Skipanin gevur framúr góðar koyri-eginleikar og gott vegtak í svingum.

Innan verður alt tað reina luksus við nøtutræ og leður og t.d. instrumentum við bláum ljósi og alu-look mittarkonsoll.

Motorurin verður ein 3,5 litur V6 við 300 hk, ið koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,5 sek og toppferðin verður 250 km/t.

# Nýggjur Renault Clio komandi summar

**Samstarvið millum Renault og Nissan kemur at merkja nýggja Renault Clio, ið verður bygdur yvir sama plattform sum Nissan Micra og kemur á marknaðin komandi summar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein av mest seldu bilum í Evropa, Renault Clio, verður skjótt avloystur av einum heilt nýggjum Clio, ið kemur á marknaðin komandi summar.

Bilurin verður gjørdur í samstarvi við Nissan við sama plattformi sum Nissan Micra.

Bensinmotorarnir verða í støddum frá 60 til 170 hk og tveir dieselmotorar við ávikavist 64 og 82 hk.

Í 2006 kemur Clio Sport við 3,0 litur V6 motori og 226hk, og í 2007 væntast ein MPV-útgáva av Clio.




*Renault Clio 2005 sum kemur á marknaðin komandi summar*